ÚT AT KOYRA

# Hyundai Matrix 1.5 CRDi



Hyundai Matrix, ið kom á marknaðin seinasta heyst, fæst nú við einum 3 syl. 1.5 litur turbodiesel motori við commonrail innspræning og 82 hk. Bilurin kostar 175.750,- hjá Norðbil.

*Kelda: Norðbil / Hyundai Bil Import A/S*

# Transporter í Danmark



Hóast modellið er 12 ára gamalt, bleiv VW Transporter aftur í 2001, mest seldi vørubilur í Danmark

*Kelda: Motor Magasinet*

# Mazda MPV diesel



Mazda MPV, ið higartil einans hevur fingist við 2.0 litur bensinmotori, var á bilaframsýningini í Bruxelles við 2.0 litur 16V turbodiesel motori við commonrail innspræning og 136 hk.

*Kelda: Motor Magasinet*

# Ongar speiskar viðmerkingar til bilføraran

**Ein nýggj kanning, ið er gjørd av tveimum professarum og fíggjað av Uniroyal dekkfyritøkuni, vísir, at tey ferðandi í bilinum kunnu verða viðvirkandi til álvarsligar ferðsluvanlukkur. Hinvegin er tað er tað eisini prógvað, at tað, at onnur eru við í bilinum ger at bilførarin betri virðir ferðaavmarkingar og ferðsluljósini**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*



*Heldur hjálpa bilføraranum enn at koma við speiskum viðmerkingum. Bilførarin kennir seg eyðmýktan, tá tey ferðandi í bilinum finnast at hansara koyrimáta*

Kanningin vísir eisini at passaserarnir kunnu hava positiva ávirkan á koyringina hjá bilføraranum, við at skapa ein góðan stemning í bilinum. Tey ferðandi skullu lata vera við at finnast at bilføraranum hvørja ferð hann ger eitt lítið mistak, tí tað kann ganga út yvir koyritrygdina, siga teir báðir professararnir sum hava gjørt hesa kanningina.

## Hevði ynskt ein bremsupedal

Vanliga dáma bilførarum at hava passaserar við í bilinum, men at tað eisini kann verða ein slítandi uppliving, munnu teir flestu bilførarar hava uppliva. Talan kann vera um ein ungan bilførara, sum nýliga hevur fingið koyrikort, ella tað at bilførarin ikki heldur frástøðuna til bilin frammanfyri. Hetta kann virka nervaslítandi uppá tann sum situr við liðina á bilførarnum, sum spennur føturnar í dúrkið og hevði ynskt at ein bremsupedalur var har.

## Ongar speiskar viðmerkingar

Tá nógv stendur á, falla ofta onkrar speiskar viðmerkingar, sum lættliga kunnu føra til at eina vanlukku. Ìstaðin fyri at lata seg ávirka av einum nervøsum passaseri, ráða teir, ið hava gjørt hesa kanningina til, at bilførarin vísir tolsemi, roynir at skilja støðuna sum tann ið situr við lið hansara er í, og ikki lata seg ávirka til at gera nakað skeivt. Á sama hátt skulu tey ferðandi ansa sær og lata vera við at koma við óneyðugan atfinningum.

*Kelda: FDM / Motor*

## 10 góð ráð til tey ferðandi

1 Góðtak at tað er bilførarin sum koyrir bilin
2 Latið vera við at finnast at koyrimátanum hjá bilføraranum
3 Royn at lata vera við at vísa at tú ert bangin
4 Ikki keglast undir koyring
5 Tey ferðandi skulu vera rólig, og t.d. rætta seg eftir hvussu hart bilførarin vil hava radio frá o.s.fr.
6 Ikki streingja á bilføraran við at minna hann á at hann er í tíðarneyð
7 At rósa og stuðla bilføraranum gevur trygga koyring
8 Hjálp bilføraranum til at vera ein góðan eygleiðara og vegvísara
9 Havið vakið eyga við ferðsluni, og gerið bilføraran varugan við møguligan vanda, um hann ikki longu sjálvur hevur sæð hendan vanda
10 Tey ferðandi mugu leggja uppí um bilførarin virkar yvirtroyttur og ikki orkar at koyra. Tá ber til at koma við uppskoti um ein stuttan steðg.

# Nýggjur BMW 500 næsta ár

**BMW 500 røðin verður skift út eftir summarfrítíðina næsta ár. Designarnir eru lidnir við sítt arbeiði, og BMW verksmiðjan er so smátt farin í gongd við framleiðsluna. Fyri at lætta um hendan stóra bilin, verða fleiri lutir gjørdir úr aluminium**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

BMW bilarnir í nýggju 500 røðini koma fyri ein part at líkjast tí størra BMW 700, og koma eins og teir, at hava alla ta nýggjastu tøknifrøðina. Hetta er eisini galdandi fyri undirvognin og elektronisku stýringina av motorinum. Eisini verður arbeitt við eini heilt nýggjari liósskipan, har ljósstyrkin á forlyktunum tilpassar seg eftir umstøðunum undir koyring. Eftir upplýsingum frá designstjóranum hjá BMW, koma tey ymisku BMW modellini í framtíðini ikki at líkjast so nógv hvørjum øðrum sum tey gera í dag.

*Kelda: FDM / Motor*




*Nýggi BMW 500 fær sín egna identitet. BMW modellini koma í framtíðini ikki at líkjast hvørjum øðrum so nógv sum teir gera í dag*



Nýggja skiljimaskinan hjá Fiskamarknaði Føroya:

# Enn eru nógvir leysir endar



*– Eg dugi ikki at siga, hvat vit kunnu vænta, men eg vóni, at alt gongur eftir ætlan, tá ið hendan vikan er av, sigur Oskar Joensen. Hetta hevur verið ein stævin tíð hjá Fiskamarknaði Føroya*

**– Hetta hevur verið ein trupul tíð hjá okkum. Vit tóku gomlu skiljiútgerðina niður millum jól og nýggjárs og hava "haltað" okkum ígjøgnum allan januar mánað. Vit hava eisini verið noyddir at siga skip frá okkum, tí vit klára ikki at skilja alt við hond, tá ið nógvur fiskur er, sigur Oskar Joensen á Fiskamarknaði Føroya**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tað hevur gingið striltið at fáa nýggju skiljimaskinuna, sum Noma Tek og Formula Fo hava bygt til Fiskamarknaðin Føroya á Toftum, at virka eftir ætlan. Enn hevur maskinan, sum ætlandi skuldi takast í nýtslu fyri 10-12 døgum síðan, ikki verið til nakra hjálp. Men vónandi verður hon tað um ikki so nógvar dagar aftrat.

– Vit høvdu fund við leverandørarnar týsdagin, og teir vónaðu, at skipanin koyrir mánadagin komandi. Dagar hava verið ásettir fyrr, men teir hava ikki hildið. So, vit kunnu bara vóna tað besta, sigur Oskar Joensen.

Sum skilst, hevur hetta verið ein rættiliga strævin tíð hjá Fiskamarknaði Føroya.

– Vit tóku gomlu skiljiútgerðina niður millum jól og nýggjárs og hava "haltað"okkum ígjøgnum januar mánaða. Vit hava eisini verið noyddir at siga skip frá okkum, tí vit klára ikki at skilja alt við hond, tá ið nógvur fiskur er.

## Leysir endar

Oskar vísir á, at teir eru byrjaði so spakuliga at skilja við nýggju útgerðini, men enn eru nógvir leysir endar, og bert smáar nøgdir eru skildar við nýggju maskinuni.

– Mánadagin, týsdagin og mikudagin koyrdu vit nakað av fiski ígjøgnum, men hetta eru so smáar nøgdir, at enn noyðast vit at seta okkara álit á hondskiljingina.

Oskar sigur, at Fiskamarknaður Føroya hevur ikki nokk av fólki bæði tilskiljimaskinuna og hondskiljingina samstundis, og tí er hetta ein trupul støða.

– Men tað lættir nógv um, at lítil fiskur er á marknaðinum í løtuni, leggurhann aftrat.

Spurdur, hvat tað er fyri trupulleikar, leverandørarnir dragast við, sigur Oskar, at talan bæði er um tað mekaniska og tað teldustýrda. Umboð fyri Noma Tek og Formula Fo eru enn á Toftum, og teir hava góðar vónir um, at alt fer at virka eftir ætlan. Hetta er alt nýtt og ikki roynt áður.

– Eg dugi ikki at siga, hvat vit kunnu vænta, men eg vóni, at alt gongur eftirætlan, tá ið hendan vikan er av, sigur Oskar Joensen.

## Framkomin maskina

Skiljimaskinan, sum Noma Tek og Formula Fo hava sett upp hjá Fiskamarknaði Føroya á Toftum, er tann fyrsta av sínum slagi. Maskinan hevur nógvar ymiskar stýringar, og tí hevði neyvan nakar roknað við, at alt fór at ganga uppá stás, fyrr enn skipanin er royndarkoyrd eina tíð.

– Tá ið alt alt er komið uppá pláss, ivist eg ikki í, at maskinan kemur at lætta nógv um skiljingina, segði Oskar Joensen við Sosialin í síðstu viku.

Skiljandi er, at Fiskamarknaður Føroya er vorðin eitt sindur ótolin, nú tað hevur drigið út við at fáa maskinuna at virka eftir ætlan, tí hetta ger, at gerandisdagurin verður so trupul.

Og somuleiðis er tað eisini spell, at marknaðurin hevur verið noyddur at siga skipum frá sær.

Tað serliga við hesi skipanini, er, at allur tann skildi fiskurin kemur út av endanum. Vanliga standa eini 10, 12 ella 14 kør við eina skiljimaskinu, og hesi "portur" taka nógv pláss. Hendan maskinan er líka sum í tveimum. Hon skilir fiskin uppí kør, sum taka 300-400 kg., og tá ið tey eru full, verður fiskurin stoyttur niður á band, sum førir hann út av endanum. Har standa so tvey kør, sum taka ímóti tí skilda fiskinum.

Nýggja skiljimaskinan kann eisini skilja fiskin frá tveimum skipum í senni — ella t.d. fisk frá einum skipi á aðrari "linjuni" og útróðarfisk á hinari.

## Øktur kapasitetur

Fiskamarknaður Føroya hevur havt eina Scanvægtskiljimaskinu, sum kundi skilja eini 10-12 tons um tíman - alt eftir, hvussu gekst. Haraftrat hevur marknaðurin havt eina hondgjørda linju, sum FJM í Runavík bygdi.

Mett verður, at nýggja maskinan skilir eini 20-30 tons um tíman, tá ið hon virkar eftir ætlan.

